# VIÐTØKUR
# FYRI ELDRASAMBÝLIÐ
# VESTURSTOVU

# Í FUGLAFIRÐI

Fuglafjarðar býráð góðkenning tann 26. mei 2005
Fuglafjarðar býráð broyting 26. mei 2005

# Viðtøkur

## § 1

Navnið á heiminum er **VESTURSTOVA** við heimstaði í Fløtugerði nr. 4 í Fuglafirði.

Heimið er bygt fyri at loysa tørvin fyri røkt av eldri og/ella óhjálpnum fólki í Fuglafjarðar kommunu.

**Stk. 1.** Heimið heldur til í nýggjum bygningi, sum Fuglafjarðar kommuna hevur latið bygt og útbygt til endamálið.

**Stk. 2.** Fuglafjarðar kommuna rindar hallið av rakstri.

**Stk. 3.** Fuglafjarðar kommuna rindar útreiðslurnar fyri náttarvakt sambært rokning frá Heimarøktini.

**Stk. 4.** Heimarøktin letur starvsfólk til dag-, kvøld- og náttarvakt og hevur dagligu fyrisitingina av sjálvum arbeiðinum á heiminum.

**Stk. 5.** Uppihaldsgjøld til kommununa verða kravd frá brúkarunum eftir galdandi reglum á økinum.

## § 2

**Stk. 1.** ***Endamálið við heiminum er:***

- At taka upp heimabúgvandi pensjónistar, ið hava tørv fyri varandi røkt ella støðugari umsjón alt samdøgrið í styttri ella longri tíð fyri at lætta um hjá teimum avvarðandi, og í sambandi byrja at leggja til rættis umsorgarliga viðferð, sum fremur vælveru hjá tí einstaka.

- At taka upp heimabúgvandi pensjónistar, ið hava tørv fyri varandi røkt ella støðugari umsjón fyri styttri ella longri partar av degnum.

- Eitt fast búpláss til pensjónistar, ið hava tørv fyri varandi røkt ella støðuga umsjón alt samdøgrið, og í hesum sambandi at leggja til rættis umsorgarliga viðferð, sum fremur lívsgóðsku hjá tí einstaka.

**Stk. 2.** Í tí vavi, tað er sambærligt við endamálið, sum lýst í stk. 1, kunnu pensjónistar við øðrum tørvi enn varandi røkt ella støðugari umsjón, verða upptiknir á heimið.

## § 3
## Leiðsla

**Stk. 1**. leiðslan fyri heimið er **SOSIALA NEVNDIN**.

**Stk. 2.** Fyri hvønn lim verður valdur ein varalimur, ið tekur sæti í stýrinum, tá ið viðkomandi limi berst frá. Hesir skulu verða býráðslimir.

**Stk. 3.** Stýrislimur verður sitandi í stýrinum, til nýggjur er valdur í hansara stað.

**Stk. 4**. Býráðsskrivarin er skrivarin hjá leiðsluni.

**§ 4**
**Stýrið**

**Stk. 1.** Stýrið heldur fund í minsta lagi tvær ferðir árliga, og annars tá ið ein limuir krevur tað.

**Stk. 2.** Stýrið er viðtøkuført, tá í minsta lagi 2 av limunum eru hjástaddir.

**Stk. 3.** Stýrið tekur avgerð um keyp av innbúgvi, hjálpitólum vm. Eftir góðkendari fíggjarætlan.

**Stk. 4.** Stýrið førir gerðabók yvir tær á fundinum tiknu avgerðir. Gerðabókin verður undirskrivað av teimum limum, sum eru á fundi.

**Stk. 5.** Stýrið hevur ovastu leiðsluna av heiminum og hevur ábyrgd av fíggjarviðurskiftunum.

**§ 5**
**Upptøka**

Stk. 1. Upptøkunevndin hjá heiminum tekur avgerðir um upptøku á heimið, tá tað snýr seg um fastbúgvandi og skulu hesi verða úr Fuglafjarðar kommunu.

**Stk. 2.** Økisleiðarin fyri Heimarøktini tekur avgerð um upptøku á heimið, tá tað snýr seg um dag- og/ella samdøgurdumlætting, og skulu umsøkjarar úr Fuglafjarðar kommunu hava fyrstarætt. Tó er eisini møguleiki fyri at taka umsøkjarar úr øðrum kommunum inn á heimið, um so verður at tøkt pláss er, og um avvarðandi kommuna váttar at luttaka í gjaldinum.

**Stk. 3.** ***Upptøkunevndin hevur 4 limir:***

1. Umboð valt av býráðnum, sum er formaður.
2. Økiusleiðarin fyri Heimarøktini í Eysturoynni.
3. Fyristøðufólkið fyri Eysturoyar Røktar- & Ellisheim.
4. Kommunulækni.

Viðvíkjandi upptøkunevndini verður víst til kunngerð nr. 71 frá 27. august 1998 um "Eldrasambýli" Kapittul 3... Eldrasambýlið hjá kommununi § 8, stk. 2 of sambært § 8, stk. 3, skal Almanna- og Heilsumálaráðið tilnevna kommunulæknan, sum verður í upptøkunevndini.

## § 6
## Fíggjarætlan vm.

**Stk. 1.** Roknskaparárið er álmanakkaárið.

**Stk. 2.** leiðslan ger uppskot til fíggjarætlan fyri heimið í seinasta lagi 1. september á hvørjum ári og verður at senda býráðnum til endaliga góðkenning.

## § 7
## Starvsfólk vm.

**Stk. 1.** Leiðarin á Heimarøktini setir og loysir úr starvi fólk, sum skulu arbeiða á heiminum eftir tilmæli frá økisleiðaranum.

**Stk. 2.** Náttarvaktirnar á heiminum skulu verða góðkendar av býráðsleiðsluni.

**Stk 3.** Búfólk og ella avvarðandi kunnu ikki gera endurgjaldskrav til Heimarøktina/býráðið, um nakað skuldi hent teimum likamliga ella okkurt skuldi misfarist, meðan viðkomandi býr á heiminum.

**Stk. 3.** Búfólk á heiminum fáa hjálp frá Heimarøktini undir somu treytum, sum tá tey búgva heima.

**Stk. 4.** Heimarøktin átekur sær onga ábyrgd av búfólkunum, umframt ta vanligu ábyrgdina, starvsfólkið annars hevur í sínum arbeiði.

## § 8
## Gjald

**Stk. 1.** Fastbúgvandi búfólk rinda fyri húsaleigu, olju, el, mat o.t. við kr. 3.100,00 um mánaðan.

**Stk. 2.** Hjún, sum bæði eru á pensjónistar, har annað er á røktarheimi/sambýli verður gjaldið niðursett til kr. 2.100,00.

**Stk. 3.** Búfólk til umlætting rinda fyri húsaleigu, olju, el, mat o.t. við kr. 100,00 fyri samdøgursumlætting og kr. 50,00 fyri dagumlætting.

**Stk. 4.** Uppihaldsgjaldið verður flutt á konto í peningastovni, sum verður umsitin av Fuglafjarðar kommunu.

## § 9
## Eftirlit vm.

Fuglafjarðar kommuna kann áseta nærri reglur um upplatingartíðina hjá heiminum, herundir um heimið skal hava opið alt árið ella part av árinum.

## § 10
## Lógarheimildir

**Viðvíkjandi heimild fyri heiminum verður víst til:**

Kunngerð nr. 82 frá 29. mei 1997 um heimahjálp
Kunngerð nr. 106 frá 11. juni 1997 um heimasjúkrasystratænastuna
Kunngerð nr. 88 frá 06. juni 1997: Løgtingslóg um heimasjúkrasystartænastuna
Kunngerð nr. 76 frá 23. mei 1997: Løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg
Rundskriv um Heimarøktina frá 01. september 1997
Kunngerð nr. 71 frá 27. august 1998 um "Eldrasambýli"

**§ 11**
**Broytingar**

**Stk. 1.** Fuglafjarðar býráð kann gera broytingar í viðtøkunum, eftir at stýrið hevur fingið høvi til at geva sítt ummæli.

**Stk. 2.** Um heimið heldur uppat, skulu ognir tess verða nýttar til frama fyri pensjónistum í Fuglafjarðar kommunu, sum hava tørv fyri varandi røkt ella støðugari umsjón alt samdøgrið.

Viðtøkurnar eru góðkendar av Fuglafjarðar býráð tann 26. januar 1999, meðan § 3 leiðsla er broytt tann 26. mei 2005.

**Fuglafjarðar býráð**

Sigurð S. Simonsen
borgarstjóri

// Jákup Frants Larsen
býráðsskrivari